Starvslýsing

Heimatænastan

## Trý røktarstarvsfólk til Røktarheimið á Mørkini

Søkt verður eftir einum sjúkrarøktarfrøðingi, einum heilsurøktara og einum heilsu-/sjúkrahjálpara at byrja 1. oktober 2007 ella skjótast tilber. Arbeiðstíðin er 28 tímar um vikuna.

**Vit søknast eftir fólki, ið:**
- hevur útbúgving sum Sjúkrarøktarfrøðingur, Heilsurøktari, Sjúkrahjálpari/ Heilsuhjalpari.
- hevur hug og hegni at veita røkt og umsorgan til húsfólk okkara
- tekur undir við visjónini um at skapa eitt heimligt og lívligt umhvørvi
- hevur hug og hegni at samstarva við ymiskar fakbólkar

Fólk við royndum innan eldrarøkt hava eisini møguleika at søkja.

**Vit bjóða:**
- góðar arbeiðsumstøður í nýggjum heimi
- eitt spennandi og mennandi starv, har arbeitt verður tvørfakligt
- eitt starv við nógvum avbjóðingum
- eitt starv í einum øki, sum er í støðugari menning

**Setanartreytir:**
Setanarøkið fevnir um Nærverkið. Tænastustaðurin í løtuni er Røktarheimið á Mørkini. Starvið verður lønt eftir sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi fakfelag.

Nærri fæst at vita um størvini við at venda sær til Kristbjørg Toftegaard, virkandi deildarleiðara, á telefon 471050 ella 214570.

**Umsókn:**
Umsóknir skulu sendast til:

**Røktarheimið á Mørkini**
Neystavegur
435 Streymnes
Stílað:Kristbjørg Toftegaard

**Umsóknarfreist: 14. september 2007.**

Røktarheimið á Mørkini er ein samskipaður partur av Heimatænastuni Vágar / Norðstreymoy.
Fyrstu húsfólkini fluttu inn í mai 2006. Á Mørkini eru 26 búpláss og 6 umlættingar pláss. Heimið er býtt út í 4 húskir við 8 húsfólkum í hvørjum húski.
Aðalsetningurin fyri heimið er at skapa eitt heimligt og livandi umhvørvi, har trivnaður og sjálvaavgerðarrættur hins einstaka er í hásætið.

**Les meira á www.naerverk.fo / leys størv**

Nærverkið kemur út til borgaran at veita tænastur, ið fevna um eitt nú stuðul, tilboð til borgarar við serligum tørvi og tænastur til barnafamiljur og eldri. Nærverkið er sjálvstøðugur stovnur undir Almanna- og heilsumálaráðnum. Umframt Meginskrivstovuna, ið hevur yvirskipaðu leiðsluna, eru fýra deildir: Heimatænastan, Trivnaðartænastan, Stuðulstænastan og Barnatænastan. Nærverkið leggur áherðslu á nærleika, umsorgan og professionalismu í øllum lutum. Umleið 1400 fólk starvast í Nærverkinum.

NÆRVERKIÐ

Meginskrivstovan, Postsmoga 3037, 110 Tórshavn, Tel 30 40 20, Faks 30 40 10, meginskrivstovan@naerverk.fo

www.naerverk.fo

Starvslýsing

Stuðulstænastan

## Tvey starvsfólk til sambýlini í Sandavági

Søkt verður eftir tveimum starvsfóllkum til sambýlini í Sandavági at byrja skjótast gjørligt, í seinasta lagi 1. november 2007.

Í sambýlunum búgva sinnisveik fólk, ið hava tørv á eginumsorgan, tryggleika og einum struktureraðum gerandisdegi. Fleiri aktivitetir eru bæði inni og uttan fyri húsið, har starvsfólkini luttaka aktivt saman við búfólkunum.

**Arbeiðið fevnir um:**
- At stimbra og menna praktiskar og sosialar førleikar hjá búfólkunum
- At stimbra ígongdsetan av virksemi, ið búfólkini ynskja ella hava tørv á
- At geva ráð og vegleiðing í vanligum dagligum virki, samstundis sum atlit verður tikið til, hvat búfólkini megna
- At skipa so fyri, at búfólkini fáa møguleika at leggja gerandislív sítt soleiðis til rǽttis, at tað verður í samsvar við egnan tørv og normar.

**Førleikar:**
- Viðkomandi heilsu-sosialfakliga ella pedagogiska útbúgving
- Royndir innan psykiatriska økið
- Tol og eina jaliga menniskjafatan
- Evni at handfara og trívast við einum arbeiðsdegi, íð onki kann sigast um frammanundan
- Áræði, hug og hegni at arbeiða sjálvstøðugt.

**Setanartreytir:**
Setanarøkið er Nærverkið, arbeiðstíðirnar eru skiftandi, dag-, kvøld-, náttar- og vikuskiftisvaktir. Tann, íð settur verður má kunna tola broytingar í starvinum, og at hetta kann verða umskipað til eisini at fevna um aðrar uppgávur. Løn sambært avtalu millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi yrkisfelag.

Fleiri upplýsningar um størvini fáast hjá Signu Andreasen, leiðara, tlf. 283213.

**Umsókn:**
Send eina umsókn til:

**Sambýlið**
Traðarvegur 34
360 Sandavágur
Stílað: Signa Andreasen, leiðari

**Umsóknarfreist: 20. september 2007.**

**Les meira á www.naerverk.fo / leys størv**

Nærverkið kemur út til borgaran at veita tænastur, ið fevna um eitt nú stuðul, tilboð til borgarar við serligum tørvi og tænastur til barnafamiljur og eldri. Nærverkið er sjálvstøðugur stovnur undir Almanna- og heilsumálaráðnum. Umframt Meginskrivstovuna, ið hevur yvirskipaðu leiðsluna, eru fýra deildir: Heimatænastan, Trivnaðartænastan, Stuðulstænastan og Barnatænastan. Nærverkið leggur áherðslu á nærleika, umsorgan og professionalismu í øllum lutum. Umleið 1400 fólk starvast í Nærverkinum.

NÆRVERKIÐ

Meginskrivstovan, Postsmoga 3037, 110 Tórshavn, Tel 30 40 20, Faks 30 40 10, meginskrivstovan@naerverk.fo

www.naerverk.fo

**WELLNESS GRUPPE REJSER TIL POLANICA**

Med Danuta som guide/tolk
Fra 23.sept til 9.okt.

Fly fra Kastrup,1/1 pens. 3 behandlinger pr.dag
**Pris 7.500 kr i dobbelt værelse**



**Rejsehuset 0045 39901390**
**www.rejsehuset-rejser.dk**
**Fonn Flog 45636**

## Pakkifólk og skúlaungdómur

Vegna økt virksemi verður søkt eftir røskum og álítandi pakkifólki.

Eisini søkja vit eftir røskum skúlaungdómi til pakkiarbeiði seinnapartar.

Hevur hetta tín áhuga er tú vælkomin at senda okkum ein teldupost á **regin@gron.fo**

**P/F Grón**
Hoyvíksvegur 65 • Postboks 1048
110 Tórshavn

## STARVSLÝING

Søkt verður eftir einum fólki at gera reint í Tofta skúla.

Reingerðin er 4 tímar um dagin, 5 dagar um vikuna.

At byrja 15.09.07 - ella skjótast gjørligt

Løn sambært sáttmála við Føroya Arbeiðarafelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya.

**Skrivligar umsóknir skulu sendast til:**
Nes kommunu, Toftavegur 3 650 Toftir
**í seinasta lagið 07.09.07 kl. 12.00.**

Nærri upplýsningar fáast við at venda sær til Nes kommunu tlf. 447586.

**NES KOMMUNA**
nes@nes.fo • www.nes.fo

Lesið Sosialin - so eru tit við